# Ein heilsan til Lívdina



17. august 2010

Síðani vit fóru úr Føroyum, hava vit verið í Belfast, Norðurírlandi, og í Japan. Í Belfast luttóku vit á einum fyrireikingarskeiði hjá Mission Africa í fýra dagar. Har fingu vit undirvísing um nigerianskan politikk, mentan og trúarlandslag. Eisini høvdu vit ein heilan dag um trygd, tí sjálvt um nigerianarar eru eitt vinarligt fólkaslag, so er eisini neyðugt at vera ansin.

Vit hava nú verið í Japan í sjey vikur. Tað hevur verið gott at verið saman við familjuni og samkomuni her, áðrenn vit fara til Nigeria. Her er vanliga millum 30 og 37 stig, so tað er góð venjing til Afrika, hóast vit viðhvørt snýta og nýta air condition. Tann 4. september verður eitt serligt møti her, har vit hava møguleika at greiða meiri frá verkinum, sum ætlanin er, at vit skulu vera partur av í Ankpa. Vónandi fer tað at ganga væl.

Tann 10. septembur fara vit aftur til Stóra Bretland, har vit fyrst skulu á eina ráðstevnu hjá Mission Africa í London og so til Glasgow at hitta stuðlar hjá Mission Africa. Orsøkin til, at vit skulu til Skotlands, er, at av tí at vit hava búð í Skotlandi, verða vit tí send ígjøgnum skotsku skrivstovuna hjá Mission Africa. Eisini vil okkara samkoma í Glasgow hoyra meiri frá okkum, tí tey vilja vera við í verkinum eftir førimuni.

Vit eru nú næstan klár at fara. Tað er ótrúligt, hvussu nógv skal gerast, áðrenn vit sleppa avstað. Nú eru allar vaksinasjónirnar næstan lidnar. Bara nakrar hjá Kano eru eftir, tí hon má bíða til 15. septembur, tá hon verður eitt ár. Men tað eru nógvar sproytur tilsamans: fyri gulan febur, stívkrampa, difteritis, tyfus og mangt annað gott.

Eisini hava vit góð tíðindi. Vit hava nú fingið okkara innfararloyvi til Nigeria. Tað var eitt sindur av baksi, men sum heild ikki so galið, tí mangan verður sagt, at nigerianska sendistovan er fyrsti smakkur av nigerianskum skrivstovuveldi og krevur ofta nógv stríð og strev.

Ætlanin er at koma til Nigeria í seinnu helvt av september. Flogið verður til Abuja, sum er høvuðsstaðurin og er mitt í landinum. Avgjørt er ikki at senda okkum beinleiðis til Ankpa, men fyrst til WWTC (William Wheatley College of Theology), sum er í Abia landspartinum sunnarlaga í landinum, í eini 3-5 vikur. Í WWTC eru Iris og Rufus Ogbonnah, og ætlanin er, at vit skulu læra frá teimum hesa tíðina. Iris er úr Norðurírlandi og hevur verið í Nigeria í 25 ár. Hon hevur nógv at læra okkum um mentan, siðir, og um, hvussu tað er at liva í Nigeria sum útlendingur. Eisini kann eg síggja, hvussu hon undirvísir á skúlanum har. Iris er gift við Rufus, sum er nigerianari. Hann hevur eisini verið lærari og pastorur í nógv ár, var eisini aðalskrivari í Qua Iboe Church í nøkur ár, men hevur nú lagt frá sær fyri aldur. Hann hevur sostatt eisini nógv at læra okkum um Nigeria, um samkomuna o.a. Vit vænta og vóna, at hetta verður ein lærurík tíð. Aftaná hesar vikurnar í WWTC fara vit norður til PACT (Peter Achimugu College of Theology) í Ankpa í Kogi landspartinum, har vit so fáa eitt sindur av tíð til at finna okkum til rættis, gera heimið klárt og koma at kenna fólkið á skúlanum. Vónandi fái eg eisini stundir at fyrireika meg, til skúlin byrjar aftur í januar.

Sum sagt eitur skúlin, sum eg fari at undirvísa á, Peter Achimugu College of Theology (stytt PACT). Sum eg skilji, hevur skúlin einar 70 næmingar, men ætlanin er at vaksa um næmingatalið til tað tvífalda tey næstu árini. Nógvir av næmingunum eru samkomuleiðarar, og stórur partur av hinum næmingunum gerast eisini samkomuleiðarar, eftir at teir eru lidnir á skúlanum.

Eg vænti, at eg fari at undirvísa mest í bíbliugransking, t.v.s. siga Nýggja og Gamla Testamenti, sum var tað, eg gjørdist master í gudfrøði í. Men eg eri áminntur um at vera smidligur, so tað kann gott vera, at eg komi at nerta eitt sindur við samkomusøgu, kristologi ella við etikk.

Tað er sjálvandi, serliga tá hugsað verður um Kano, eitt sindur ræðandi at flyta til Nigeria, men vit eru eisini spent at fara avstað. Nú hava vit brúkt nógva tíð til at fyrireika okkum til at fara, og eg haldi, vit hava gjørt tað, vit kunnu. Men tað er bert til eitt vist, tað ber til at fyrireika okkum, áðrenn vit koma til landið. So nú haldi eg, at vit fegin vilja sleppa avstað.

Tað var sera gott at vera heima í vetur, og vit takka fyri tíðina. Eisini var gott at kunna vera saman við vinum og kenningum aftur. Spennandi var at fylgja við flytingini niðan í Skúlan við Løgmannabreyt. Eg eri glaður um, at talurnar í Lívdini verða koyrdar á heimasíðuna, so eg kann taka tær niður og lurta eftir teimum í Japan og seinni í Nigeria.

Vit biðja fyri tykkum og ynskja tykkum alt tað besta.

Takkið Harranum fyri
- at vit nú hava fingið innfararloyvi
- at vit hava møguleika at fara við til WWTC
- at vit hava kunnað verið í Føroyum og Japan, áðrenn vit fara avstað

Biðið fyri
- møtinum her í Japan tann 4. september
- møtunum, vit skulu hava í Skotlandi 13.-19. september
- at tíðin í WWTC verður góð og lærurík
- fyri trygd, sum vit ferðast, og frá sjúku og brotsverkum
- fyri PACT skúlanum, sum hevur nakrar leiðslutrupulleikar

Um Harrin leggur tær á hjarta at stuðla hesum verkinum, ber til at flyta pening á okkara kontu til endamálið í Føroya Banka 6460-4194464.
Vit vilja eisini fegin samskifta við tykkum gjøgnum teldupost (skarvur@gmail.com) ella Facebook.

Harrin signi tykkum.








